

www.oljan.fo

**Jan Müller** 31 - 01 - 2012

# Statoil millum heimsins størstu

Statoil má gerast størri, taka fleiri váðar á seg og tola at bíða longri eftir vinningi heldur fíggjarstjórin í felagnum, Torgrim Reitan, sambært Dagens Næringsliv. Rættast er at hyggja 30 til 40 ár fram. Fyri at vinna á mál mást tú leggja skjótt og stórt fyri. Tað kann gerast sera dýrt at koma ov seint til veitsluna, sigur Reitan. Statoil heldur, at tað hevur megnað at gera fyritøkuna til eitt av heimsins bestu oljufeløgum hesi seinastu 10 árini. Fyri at varðveita hesa støðu má felagið vaksa, hugsa meira uppá longri sikt og vera tíðliga úti um seg í váðafúsum økjum heldur Reitan. "Vit eru noyddir til at taka váðar á okkum sigur næstovastin í risastóra Statoil við Dagens Næringsliv. Reitan heldur, at illgongdar leiðir, óvanligar ressursir og nýggj tøkni fara at gerast framtíðarinnar gullegg fyri feløg, sum hava dirivi, vilja og evni til at bíða. Og hann vísir á, at leiting í økjum sum Barentshavinum, Grønlandi, Alaska, Kanada og Angola kunnu vera slík øki. Hóast hann einki nevnir um Føroyaøkið, so skilst kortini, at Statoil vil sínum mongu loyvum í Føroyum og sínum nógva seismiska virksemi komandi árini eisini metir Føroyaleiðina sum eitt av sínum framtíðar váðafullu leitiøkjum,men harvið eisini eitt øki, ið kann fara at geva úrslit uppá longri sikt. Vit eru komin so langt sum vit eru, tí hava hava torað at váða nakað. Og vit eru eisini noydd til at váða nakað í framtíðini. Vit mugu leggja okkum eftir leiting, og her hava vit nógv, sum enn kann mennast. Tað er her superprofitturin liggur. Sambært DN hevur Statoil ment seg til at teljast millum heimsins átta størstu oljufeløg á nógvum økjum. Ì frágreiðingini, sum Statoil-leiðslan hevur latið úr hondum er avkast, íløgur og framleiðsluvøkstur millum lyklaøkini. Avkastið av Statoil partabrævinum er í krónum uppá 250% síðani 2001 og er betri enn øll tey feløgini, sum Statoil hevur sammett seg við. Bara hjá Chevron er partabrævið omanfyri 200%. Shell og BP hava til samanbering eitt avkast uppá undir 50% hesi seinastu 10